Opnað føroyingum dyrnar inn í norðurlanda bókmentaheimin

Tað er ógvuliga týdningarmikið, at vit ikki bara viðgera okkara egnu heimligu mentunarlíkindi, men eisini fara út um eingargarðarnar og hyggja hvussu grannarnir arbeiða, og tað hevur Birgir Kruse gjørt við mentunartátti sínum Vetrarbreytin í Útvarpinum. Týsdagin fær hann handaða NORDBOK-heiðursløn sum viðurkenning fyri arbeiði sítt

Pól á Kletti

NORDBOK er ein av listanevndunum undir norðurlendska ráðharrastýrinum. Nevndin hevur um hendi norðurlendskt bókmentaligt samstarv.

Í sambandi við, at NORDBOK hesa ferð heldur sín vársfund í Havn, verður ein stutt samkoma hildin í Norðurlandahusinum. Á hesi samkomu verður tann norðurlendska hláðmannalønin fyri 1998 latin. Virðislønin, sum er 25.000 kr., verður latin einum fjølmiðlafolki (journalisti), sum í arbeiði sínum hevur økt um kunnleikan til norðurlendskar bókmentir og ment ahugan fyri teimum.

Hesa ferð hevur NORDBOK samtykt at lata Birgir Kruse í Havn virðislønina fyri útvarpssendingar hansara, teirra millum Vetrarbreytina.

Virðislønin varð latin fyrstu ferð í 1994 – til Erik Skyum-Nielsen í Danmark. Hini, sum hava fingið hana, eru Tuva Korsström í Finnlandi, Ulf Örknklov í Svøriki og Jón Karl Helgason í Íslandi.

Samkoman í sambandi við, at Birgir Kruse fær virðislønina handaða, er almenn. Hon verður í Norðurlandahusinum tysdagin 26. mai kl. 17. Byrjað verður við tónleiki. Síðan heldur Thomas Ronstrøm, formaður í NORDBOK, ræðu og handar virðislønina.

Føroyskt umboð í nevndini í NORDBOK er Hanus Andreassen, ríthøvundur, Tórshavn. Varalimur er Martin Næs, landsbókaverður, Tórshavn.

NORBOK er stýtting fyri Nordiska Litteratur- og Biblioteks Kommitteen, á okkara máli nevnd Norðurlendska Bokmenta- og Bókasavnsnevndin.

Øll norðurlond eru umboð í nevndini. Tey, sum vald verða í nevndina, skulu antin vera virkandi ríthøvundar, ella hava royndir við útgávu ella bókuvarðsarbeiði, ella kanska bókahandilsarbeiði.

Hanus Andreassen, umboð í NORDBOK-nevndini: – Tá ein í norðurlandahópi hevur tikið hetta stigið, at lata einum fjølmiðlafolki tilika virðisløn, liggur ein tileggjan um at lata fjølmiðlarnar meira upp fyri mentanini. Virðislønin skal metast sum eitt tekin um, at gaað verður eftir journalistunum, tá teir fara út um egnar eingjargarðar og sýna áhuga ikki bara fyri tí, sum hendir heima á landi, men eisini tí, sum hendir uttanfyri

Verandi formaður í NORDBOK, Thomas Ronstrøm, er skrivari í svenska bókhandlarafelagnum.

Vekja áhuga fyri norðurlanda bókmentum

Tann klassiska virðislønin í norðurlandahópi er Bokmentavirðisløn Norðurlandaráðsins, ið latin verður norðurlendskum skaldum. Henda virðisløn, ið Birgir Kruse fær, verður bara latin fjølmiðlafolkum.

Dimmalætting hevur hitt føroyska umboðið í NORDBOK-nevndini, Hanus Andreassen, og spurt hann um treytirnar fyri at lata einum fjølmiðlafolki hesa virðisløn:

– Treytin fyri at lata einum journalisti hesa virðisløn, er, at hann hevur gjørt vart við og vakt áhuga millum folk fyri norðurlendskum bókmentum. T.v.s., at hann skal í eini ella fleiri sendingum ella eini ella fleiri bláðgreinum hava viðgjørt norðurlendskar bókmentir, og ikki bara bókmentir í sínum egna landi. Hvussu journalisturin ger hetta arbeiði, er individuelt. Hann kann t.d. hava skrivað eina ritgerð, hann kann hava havt eina sending í útvarpi ella sjónvarpi, ella hann kann hava gjørt eina heila greinarað ella sendirað ella fleiri samraðir.

Síðan 1994 hevur virðislønin verið latin á hvørjum ari. Hanus Andreassen sigur, at tað er møguligt, at okkurt ár kann fara burt uttanillum, at eingin virðisløn verður latin. Alt veldst um hoskandi kandidat at fáa hana.

Og higartil hevur verið royndt at finna kandidatar úr ymiskum londum, so at eitt avlst land ikki fleiri ár upp í rokur fer hana. Men hinvegin er hetta ein spurningur um hoskandi kandidatar eru at finna í ymsu londunum.

Birgir lýkur treytirnar

– Eg má viðgangs, at eg var eitt sindur í iva, tá eg hugsaði um eitt møguligt føroyskt evni. Men so kom hugskotið: Vetrarbreytin! Just í hesum mentanartátti hevur Birgir Kruse givið norðurlendskum bókmentum innivist. Umframt at hava vent sær til fleiri føroyskar ríthøvundar, hevur hann eisini varpað ljós á bókmentir í grannalondunum, sigur Hanus Andreassen.

Sum dømi kann nevnast, at Birgir Kruse hevur havt samraðu við finnlandssvenska skaldkonuna Tuu Forsström, sum í ár fekk Bokmentavirðislønina Norðurlandaráðsins. Hann hevur umrætt íslendska stórskaldið Halldor Kiljan Laxness, sum andaðist fyrr í ár. Og hann hevur hitt norska javnstøðustriðskvinnuna Berit Aas o.s.fr., o.s.fr. Á breiðum grundarlagi hevur Birgir Kruse viðgjørt bókmentir í øllum Norðurlondum í mentanartátti sínum og lykur tí treytirnar at fáa virðislønina.

Tá nevndin í NORDBOK skuldi taka støðu til eitt virðislønarevni, útvegaði føroyska umboðið í nevndini sjálvandi neyðuga tilfarið, ið nýtast kundi sum grundgeving fyri at skjota Birgir Kruse upp.

– Eitt yvirlit varð gjørt yvir sendingarnar í Vetrarbreytini og síðan umsett og lagt fyri nevndina. Og nevndin helt hetta vera so vel argumenterað, at rættiliga stór undirtøka var fyri at lata Birgiri Kruse virðislønina í ár, sigur Hanus Andreassen.

Brotið darvandi skilaveggir niður

Hanus Andreassen sigur, at hann í sínu tíð sum virkin í bókmentaheiminum hevur upplivað, at bókmentir og list hava verið flokkað í tað, sum verður ropt -finkulturur- og tað, sum er -fyri fjøldina.

– Eg haldi tað vera eitt sera óheppið skilarum – og pura óneyðugt eisini – tí at 'kvalitetur' er í grundini fyri øll. Og øll kunnu góðtaka og hava gleði av 'kvaliteti'. Og fyri at brota skilarúmið niður, krevst, at tey fólk, sum arbeiða við list og upplýsa um hana, eru pedagogar. Og eg haldi, at just hesar sendingarnar hjá Birgiri Kruse eru dømi um sovorðnar pedagogiskar sendingar. Hann hevur eina sending, ið tekur næstan í tíma, har hann hevur tónleik, sum teim flestu dámar – m.a. eisini ungdóminum. Hann hevur rock, popp og country-tónleik – eitt úrval fyri allar aldursbólkar. Upp í hetta blandar hann m.a. orðaskifti um mentun og mentunarpolitikk, sigur Hanus Andreassen.

Vist verður a, at Birgir hevur samraðir við ríthøvundar og fær føroyskar ríthøvundar at koma við einum innleggi um okkurt evni. Og hann ringir til onkran ummælara í Danmark og skiftir orð um onkran danskan yrkjara mitt í øllum. Á tann hátt hevur Birgir megnað at brotið tað skilarúmið niður, sum altið hevur lyndið til at reisa seg og gera tað tvørligt hjá fólki at fáa samband við skaldskap og bókmentir.

Eitt dømi um hetta er sendingin í Vetrarbreytini um -Titanic-, í sambandi við, at storfilmur um hetta viðgátna skipbrot var at sigga í Føroyum. Birgir fyrireikar seg væl. Og tá alt er klárt ringir hann til norska ríthøvundin Fossnes-Hansen, ið skrivað hevur skaldsøgu við hesum sorgarleiki sum evni, -Salme ved reisens slutt-.

– Á tann hátt fingu vit bæði at vita nakað um sjálva hendingina í 1912, tá -Titanic- sakk, vit fáa nakað at vita um filmin og vit fáa nakað at vita um hvussu hendingin er brukt í bókmentunum, t.d. í skaldsøgunni hjá Fossnes-Hansen, sigur Hanus Andreassen.

Í sambandi við bygnað arbeytingar í landsumsitingini fingu vit eitt mentamalastyri. Nýggur mentamalastjóri varð Jóannes Dalsgaard. Og hey! alt fyri eitt var Birgir til reiðar við mikrofonini og hevði eina sera áhugaverða samraðu við nýggja mentamalastjóran um føroysk ansmentanarpolitikk.

Eisini við Berit Aas, sum í eini 30-40 ár hevur stríðst fyri javnstøðu millum kvinnur og menn, hevði Birgir eina sera forvitnisligta samraðu, har Berit við heilt fáum orðum avdukaði tær snildir, men stundum brúka til tess at fáa tamarhald á kvinnuni og koma sær sjálvum fram.

Tá Halldor Laxness andaðist fyrr í ár, eydnaðist tað Birgir at fáa Turið Sigurðardottur at hava minningarorð í Vetrarbreytini – um eitt tá stórsta skaldið í Norðurlondum í okkara øld.

Og fólk lurta!

Tekin um heildarmenning

Hanus Andreassen sigur, at hann metir sendingarnar hjá Birgiri Kruse vera eitt dømi um eina menning, sum í sínu heild er at sigga í føroysku fjølmiðlunum.

Eg haldi meg sigga tekin um hesa somu menningina bæði í Dimmalætting og í Sosialinum. Vit eru nu komin burtur frá hesum, at blæðini bara eru malgøgn hjá politiskum flokkum. Tað var, haldi, eg óvðileggjandi fyri støðið í fjølmiðlunum.

– Só Birgir Kruse og Vetrarbreytin eru dømi um eina menning, sum er at sigga í breiðari merking. Harvið er ikki sagt, at okkara fjølmiðlar eru fullfíggaðir. Tað eru teir ikki, sigur Hanus Andreassen.

Virðislønin ein tileggjan

– Tá ein í norðurlandahópi hevur tikið hetta stigið, at lata einum fjølmiðlafolki tilika virðisløn, liggur ein tileggjan um at lata fjølmiðlarnar meira upp fyri mentanini?

– Eingin ivi um tað! Virðislønin er eitt tekin um, at gaað verður eftir, tá journalistarnir fara út um egnar eingjargarðar og sýna áhuga ikki bara fyri tí, sum hendir heima á landi, men eisini tí, sum hendir uttanfyri, sigur Hanus Andreassen.

Hann sigur hetta vera ógvuliga týdningarmikið. Tað er sjálvandi gott at fjalga um nærumhvørvið, men tað er líka so týdningarmikið at fjalga um sambandið við útheimin, so vit ikki bara standa í stað og tøva í sama stampi.

Áleggur okkum ábyrgd

NORDBOK er skipað sum ein høvuðsnevnd við tveimum undirnevndum, ið virka sum arbeiðsbólkar. Onnur undirnevndin er NABO. Hon arbeiðir burtuarav við studningi til grannalandabókmentir (týðingar). Tað vil sigga, at um eitt norskt forlag hevur í hyggju at geva út eina svenska bók, so ber til at søkja um stunding til týðingararbeiði og eisini lutvist til útgávuna. Hin undirnevndin er NORDFOLK, ið arbeiðir við bókavarðar- og bókasavnsarbeiði.

Og NORDBOK hevur ikki bara áhuga fyri Norðurlondum. Evguni verða eisini vend móti týðum eystan fyri Eystrasalt, Baltalondum. Studningur er latin til at týða norðurlendskar bókur til baltisk mál.

Virðislønarupphæddin, sum latin verður fjølmiðlafolki, liggur í fastari legu. Og tann studningur, sum verður latin týðingararbeiði, liggur eisini í fastari legu. Jattanin er á hvørjum ari 2,5 mio. kr., sum verður býtt millum ymsu norðurlondini. Føroyar fáa 9%.

Peningurin verður fingin til vega av fíggarætlanini hjá Norðurlandaráðnum.

Tað er just hetta skipanin, sum hevur gjørt tað møguligt eitt nú at fáa so mangar norðurlendskar barnabøkur týddar til føroyskt, umframt uðrar bókmentir.

– Hetta aleggur okkum ábyrgd, at vit gera góðar týðingar, sigur Hanus Andreassen.

Birgir Kruse er fyrsta fjølmiðlafolk í Føroyum, sum fær virðislønina fyri at hava varpað ljós á norðurlendskar bókmentir. Bókmentir og list verða stundum flokkað í tað, sum verður ropt -finkulturur- og tað, sum er -fyri fjøldina-. Eitt óheppið skilarum, tí at 'kvalitetur' er í royndi fyri øll. Og øll kunnu góðtaka og hava gleði av 'kvaliteti'. Og fyri at bróta skilarúmið niður, krevst, at tey fólk, sum arbeiða við list og upplýsa um hana, eru pedagogar. Og just hesar útvarpssendingarnar hjá Birgiri Kruse, Vetrarbreytin, eru dømi um sovorðnar pedagogiskar royndir



NORDBOK er skipað sum ein høvuðsnevnd við tveimum undirnevndum, ið virka sum arbeiðsbólkar. Onnur undirnevndin er NABO. Hon arbeiðir burtuarav við studningi til grannalandabókmentir (týðingar). Tað vil sigga, at um eitt føroyskt forlag hevur í hyggju at geva út eina svenska bók, so ber til at søkja um stunding til týðingararbeiði og eisini lutvist til útgávuna. Hin undirnevndin er NORDFOLK, ið arbeiðir við bókavarðar- og

Sev taka støðu til oljuvinnuna

El-felagið Sev hevði aftur eitt gott úrslit í fjør. Sum ein fylgja av hesum vóru prisirnir lækkaðir við 6 oyrum í fjør, og verða helst aftur lækkaðir við ársskiftið

Snorri Brend

– Hvønn leiklut skal Sev hava innan oljuvinnuna í Føroyum.

Eftir at felagið varð gjørt um til eitt orkufelag miðskeiðis í attatiarunum, liggja nýggir tættir fyri framman.

Endamálið við umskipingini var at geva rumd fyri aðrari framleiðslu og sølu enn just el.

Hesin spurningurin er verðin aktuellur aftur, nú føroyska samfelagið stendur á gattini til eina komandi oljuvinnu.

Enn hevur el-felagið ikki havt hetta málið til viðgerðar, men verður hetta gjørt einaferð í heyst.

Hetta verður m.a. nevnt í arafragreiðingini hjá Sev, sum varð lagd fram mikudagin. Ársúrslitið hjá Sev vísti eitt yvirskot upp á góðar 26 mio. kr. í fjør.

26 mió. í yvirskoti

Í arafragreiðingini verður staðfest, at Sev eisini hevur merkt til eina lyggjari gongd í búskapinum og samfelagnum annars.

El-framleiðslan var í fjør upp á 183 mio. kWH, sum er ein vøkstur upp á 0,5 prosent í mun til arið fyri. Hetta sæst eisini aftur í yvirskotinum hjá felagnum, sum er økt úr 15 mio. upp í 26 mio. kr. í fjør.

Samstundis sum el-nytslan øktist í fjør, minkaðu rentuutreiðslurnar og avskrivingarnar, og er Sev nú fær fyri at figgja ein stóran part av ilaguvirkseminum sjálvt.

– Men felagið er eisini fær fyri at klára tey stóru óhappini á rakstrargøgnini eins og neyðugar endurnyggingar, verður sagt.

Sum ein fylgja av góða úrslitinum vóru el-prisirnir lækkaðir við 6 oyrum í fjør, og verða helst aftur lækkaðir við ársskiftið í ár.

Hjá Sev arbeiða í dag 152 fólk, har 98 teirra eru fastlønt, og sum í fjør fingu útgoldið 36 mio. í lønum. Nevnast kann at í 1989 vóru 197 fólk í starvi, sum fingu utgoldnar ialt 46,7 mió. kr. í lønum.

Meiri um ársúrslitið hjá Sev í einum seinni blaði.

Krákan orsøk til streymslit

Hóast felagið hevði eitt sera gott ár í fjør, so hevur felagið kortini henda lítla, men kortini sjáldsama trupulleikan at dragast við.

Ongatið merkist hesin trupulleikin so væl sum í hesum dagum, nú tær eru í ferð við at byggja sær reiður. Og eitt sera gott og nýgv nýtt stað í hesum sambandi eru haspenningastreyrarnir hjá Sev.

Neyvan duga krákurnar at lesa hagtøl. Men í arafragreiðingini hjá Sev er eitt petti um feilir á haspenningskervinum. Av hesum feilum eru 14 prosent teirra av okendan orsøk – mest sannlíkt av krakuavum.

So seint sum í hesi vikuni vóru tveir slíkir feilir, sum krákurnar helst mugu taka upp á seg.

Krákuni dámar væl alt tað sum glitrar, og nu menn eru í ferð við at hegna kring landið, eru teir avskorna hegntráðirnir ein upplagdur lutur at taka við sær í reiðrið. Eisini spreingtráðir hevur alstóran ahuga hjá krákunum.

Fyri tann vanliga elbrukaran er hetta ikki serliga heppið, tí vil illa til, so kunnu hesir tráðir ríka haspennings-linjurnar, og leiða sostatt streymin igjøgnum, soleiðis at streymbrot verða.

Menn hjá Sev eru fult greiðir yvir henda trupulleikan, og hava sum arbeiði at kanna hesar haspenningsstreyrarnar.

Hóast teir taka reiðrið burtur á einum staði, so er eitt nýtt sett upp á sama staði bert einar 2 dagar seinni.

Men so líðandi verða allar linjurnar nú lagdar undir jørð, soleiðis at Sev, brúkarin og krákurnar sleppa undan hesum felags trupulleikanum at stríðast við og ertast inn á.

Háspenninga-steyrarnir hjá Sev eru sera vælumtóktir hjá reiðurshugaðum krákum. Men sum verri er, er hetta just orsøkin til mong streymbrot kring landið

Mynd: Kalmar